Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
Postboks 1376
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
(+298) 21 13 76
www.blf.fo
blf@blf.fo

**Til Samferðslumálaráðið**

# HOYRINGSSVAR

Viðvíkjandi: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Leingjan av barsilsfarloyvi við barsilspeningi)

Sigast skal frá, at Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya tekur undir við omanfyrinevnda uppskoti.

Tó vil Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya nýta hetta høvi at vísa á, at ásetingarnar í lógini um barsilsskipan eru í stríð við ásetingarnar í javnstøðulógini, hvørs endamál er at beina burtur allan mismun vegna kyn. Flokkar úr sitandi samgongu hava leingi havt javnstøðu sum hjartamál, og hava hesir flokkar eisini fleiri ferðir nýtt høvi at peika á javnstøðutrupulleikarnar við galdandi barsilsskipan, tá lógin fyrr hevur verið til viðgerðar.

BLF metir at tað er týdningarmikið, at landsins myndugleikar gera sítt til, at tryggja báðum kynum eins rættindi á arbeiðsmarknaðinum. At fari verður burtur frá skipanum, sum eggja kvinnum at vera heima hjá børnunum, meðan maðurin framhaldandi er á arbeiðsmarknaðinum, vinnur sær fleiri royndir, pening og møguleikar frameftir.

Galdandi lóg um barsilsskipan er greitt dømi um skipan, sum byggir á gamla fatan av kynsleiklutum, og sum greitt ger mun á kynunum. BLF er av teirri sannføring, at kvinnur og menn eiga at havt javnbjóðis rætt til pening úr barsilsskipanini, og mæla vit tískil til, at lógarbroytingin sum nú verður framd, tekur hædd fyri hesum.

*Vinarliga*

*Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya*